OFTARI BÍLIGARI SMIDLIGARI

NÚ EISINI TIL AALBORG

Frá 25. juni til 20. august



Frá 25. juni til 20. august flýgur Atlantic Airways beinleiðis til Aalborg. Aalborg er miðdepilin í Norðurjútlandi, har nógvir føroyingar hava síni áhugamál. Flogið verður úr Vágum til Aalborg og aftur hvønn leygardag.

MB TOURS Tel 322 121 | ALPHA TRAVEL Tel 352 900 | Faroe Travel Tel 312 600 | FLOGFELAG FØROYA Tel 340 000 | FONN FLOG Tel 456 363

ATLANTIC AIRWAYS

flyfaroe.com

## Odd Fellow í Havn letur dyrnar upp

Mentanarnáttina fær almenningurin høvi til at vitja handan tær vanliga stongdu dyrnar hjá Odd Fellow losju nummar eitt, Ambolturin IOOF á Grønlandsvegi 56. Opið verður frá klokkan 19-23.

Ambolturin skrivar í tíðindaskrivi, at Odd Fellow Ordanin er ein altjóða felagsskapur, sum byggir á menniskjaligu virðini. Tær tørvar ikki at hava nakra serstaka fíggjarliga, politiska ella átrúnarliga støðu fyri at gerast limur, men tú skalt verða myndugur og trúgva á eina hægri makt.

Limirnir verða kunnaðir við nógvar etiskar livireglur, sum fremja sátt og semju millum manna, livireglur sum, "at tú tænir tær sjálvum best, sum tú tænir øðrum" og "at tú skalt vera móti øðrum, sum tú vilt hava, onnur at vera móti tær sjálvum"

Odd Fellow Ordanin er sambært tíðindaskrivinum ikki so loyndarfullur, sum hann ber orð fyri at vera. Høvið verður mentanarnáttina at síggja og spyrja, um flest øll viðurskifti ordaninum viðvíkjandi. Men okkurt smávegis er, sum ikki tolir dagsins ljós, og sum bert er millum losjulimirnar.

Odd Fellow Ordanin er meira enn bert losjuarbeiði, tað røkkur eisini frá samkomum fyri eldri og sjúkum, til tað árligu gávuhandanina frá Stórlosjuni á 250.000 kr. til læknavísindi.

Úr teimum ymisku grunnunum, íð Odd Fellow felagsskapurin ræður yvir, og úr innsavningum millum brøðra og systurlosjurnar, verða eisini árliga latnar milliónir av krón-um til vælgerandi endamál.

-NuD

## Fartelefonini umborð á Norrönu

Smyril Line hevur gjørt avtalu við norska Maritime Communucations Partner um fartelefonnýtslu umborð á Norrönu

Hesum hevur norska fyritøkan boðað frá í tíðindaskrivi mikudagin.

Avtalan ber við sær, at ferðafólk og manning framyvir kunnu vanligar GSM-fartelefonir umborð á ferðamannaskipinum. Hetta verður gjørt umvegis satelitt, og er galdandi fyri tey lond, har norska felagið hevur roaming-avtalur.

-jm

Starvsfólk til Mylnuna



Nú nýggja Mylnan letur upp við Smyrilsvegin verður søkt eftir fólki M/K til fulltíðarstarv, at arbeiða aftaná skúlatíð og at arbeiða í vikuskiftinum- at byrja fyrst í juli. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

mylnan

Send umsóknina til:
Mylnan, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn.

TRIVNAÐUR Á ARBEIÐSPLÁSINUM
EVNISDAGUR Á HOTEL FØROYUM 21. JUNI
Tilmeldingarfreistin er fríggjadagin 3. juni

**FYRRAPART:**

8.45 - 9.00:
**Innskriving**

9.00 - 9.45:
**Psykiskt arbeiðsumhvørvi**
*- Lene Bilde Jacobsen Arbeiðs- og organisatiónspsykologur frá Crecea*

9.45 - 10.15:
**Ergonomi - Fysiskt arb.umhvørvi**
*- Sigrun Danielsen - fysioterapeutur*

10.15 - 10.45:
**Kaffisteðgur**
Kaffi/te við rundstykkjum

10.45 - 11.30:
**Betri kostur**
**Betri vælvera - konsentratión - úrslit**
*- Anita Højgaard - kostrágevi*
**Átakið: "frukt til fólkið"**
*- Marjun Eystberg - starvsfólkaleiðari í Føroya Sparikassa*

11.30 - 12.00:
**Sjúkrafrávera - spill av góðum kreftum** hvussu kann sleppast undan ov nógvum sjúkradøgum
*- Lene Bilde Jacobsen frá Crecea*

12.00 - 13.00:
**Døgurðasteðgur**

**Hjartafelagið luttekur við bási**
á temadegnum við upplýsandi tilfari.

Fólk fáa mátað blóðtrýst ókeypis
Kolesterol- blóðsukurblóðroynd fyri 50 kr.

**SEINNAPART**

12.45 - 13.00:
**Innskriving**

13.00 - 13.45:
**Hvørjar persónsupplýsingar kann arbeiðsgevarin skráseta og eftirkanna**
Er loyvt at skráseta sjúkradagar ella at hyggja í privatar teldupostar v.m.?
*- Turið Debes Hentze, advokatur og forkvinna í Daturáðnum*

13.45 - 14.15:
**Stress - fyribyrging og viðgerð**
*- Lene Bilde Jacobsen frá Crecea*

14.15 - 14.30
**Kaffisteðgur**
Kaffi/te við dagsins køku

14.30 - 15.15:
**Hvørjar eru avbjóðingarnar hjá arbeiðsgevaranum sum meklara í starvsfólkatrætum**
*-Turið D. Hentze, mediator m.m.c.r.*

15.15 - 16.00
**Happing á arbeiðsplássinum**
*- Lene Bilde Jacobsen Arbeiðs - og organisatiónspsykologur frá Crecea*

**Kostnaður:**
Fyri luttøku fyrrapart: 1.225 kr.
Fyri luttøku seinnapart: 1.225 kr.
Fyri allan dagin íroknað sjálvtøku borð ella frokosttallerk 2.450 kr.

SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE
*Tel 320 204 - kvasir@farodane.fo*
*Lesið meira á www.kvasir.fo*